# Súni flúgvandi í Hollandi

*Eftir at hann hevði skorað trý mál á næstbesta liðnum, fekk gøtumaðurin sunnudagin ein tíma á besta liðnum*

Tað gongur við tí rúkandi ferð hjá Súna Olsen, sum er í Hollandi. Fyri nøkrum vikum síðani skrivaði hann sáttmála við FC Zwolle í næstbestu hollendsku deildini. Sáttmálin er galdandi fram til ársenda 2001, og tá Súni fyri einum lítlum mánaði síðani fór úr Føroyum mundi tað neyvan vera nakar, sum roknaði við, at hann beinanvegin skuldi gera seg galdandi í fremstu røð.

Men Súni hevur verið sum ein annar flúgvandi hollendari. Fyrst spældi hann á næstbesta liðnum, og har gekk tað sum eftir ánni. Súni skoraði trý mál og legði upp til tvey. Tað hevði við sær, at venjarin undan dystinum á útivølli sunnudagin gjørdi av at hava unga gøtumannin við í ferðalagnum hjá besta liðnum.

Súni skuldi sita á beinkinum. Men tað vóru bara tíggju minuttir farnir, tá hann slapp inn á vøllin at royna seg. Ein av miðvallarunum varð skaddur, og venjarin gjørdi av at seta Súna Olsen á vøllin. Sambært hollendskum upplýsingum royndist Súni hampuliga væl, men tað var týðuligt, at hann ikki er í somu venjingarstøðu, sum hinir á liðnum eru.



*Hvørt hann skjótt verður flúgvandi, er ilt at siga, men í øllum førum hevur gingist væl fyrstu tíðina hjá Súna Olsen í Hollandi*

Hetta hevði við sær, at venjarin gjørdi av at skifta Súna út aftur í 69. minutti. Tá var hann púra lúgvaður.

FC Zwolle spældi á útivølli ímóti Dordrecht, sum vann 2–1. Teir komu á odda við brotssparki í 65. minutti. Í 82. minutti øktu teir til 2–0, og í yvirtíðini minkaði FC Zwolle um munin við brotssparki.

Zwolle er á fjórða plássi í næstbestu hollendsku deildini. Hollendskur fótbóltur er áhugaverdur og væl kendur um allan knøttin. Men áskoðaratalið tykist ikki altíð vera so høgt í næstbestu deildini. Sunnudagin hugdu 1500 fólk at Súna Olsen og teimum.

JH

# Henning fer til B1913

*Vil heldur stríðast fyri plássi í 1. deild, enn at spæla á Danmarksseriuliðnum hjá superligufelagnum OB*

Henning Jarnskor er í hesi vikuni farin at venja við B1913. Í síðstu viku vandi hann við superligu liðnum hjá OB. Tað gjørdi hann fyri at fáa staðfest, um hann hevði nakrar møguleikar at gera seg galdandi í superliguni:

– Troels Bech, venjarin hjá OB, segði fríggjadagin, at í fyrstu atløgu kundu teir ikki bjóða mær sáttmála. Teir í OB bjóðaðu mær at halda fram at venja við superligu liðnum, bæði fyrrapartar og seinnapartar. Í fyrstu atløgu skuldi eg spæla við næstbesta liðnum, sum er í Danmarksseriuni. Um eg stóð meg væl har, so hevði eg havt møguleikar at spælt meg upp á besta liðið. Um tað hevði eydnast, so søgdu teir seg vilja umhugsað sáttmálaspurningin.

Hetta sigur Henning Jarnskor, sum framvegis er staddur í Danmark. Hann hevur gjørt av at royna seg í B1913, har hann vitjaði nakrar ferðir fyrr í heyst. Besta liðið hjá teimum er í næstbestu deildini, og Henning heldur ikki, at tað er óhugsandi, at hann kann vinna sær pláss á besta liðnum:

– Teir eru amatørar. Tá eg ikki fái pengar fyri at spæla fótbólt í OB, so verður neyðugt at hava arbeiði við síðuna av fótbóltinum. Tí fer ikki at bera til at venja fyrrapartar. Um tað fer at eydnast at stríða meg til pláss á besta liðnum hjá B1913, sum bara venur eftir arbeiðstíð, so er betri møguleiki at koma longri, enn tað er á seriuliðnum ha OB. Feløgini fylgja væl við, hvat gongur fyri seg, sigur Henning Jarnskor, sum í fyrsta umfari hevur gjørt av at vera í Danmark inntil tað aftur verður farið undir fótbóltskappingarnar heima á landi.

JH

# Tvey sekund á vøllinum

Álopsspælarin, Lee Todd, sum spælir við Cross Farm Celtic í skotsku amatørdeildini, varð um vikuskiftið rikin av vølli, bert tvey sekund eftir at dysturin varð blástur ígongd.

Dómarin, Peter Keartes, blásti dystin í gongd, og Todd hevði hesa viðmerking til floytingarlag hansara.

- Fuck me, that was loud.

Dómarin steðgaði tí dystinum og gav honum reyða kortið. Eftir dystin segði Todd seg vera skelkaðan um tilburðin, og helt annars, at hetta var heilt ótrúligt.

JM

# OB tapti á heimavølli

*FC Midtjylland er nú fremst í superliguni. Næstu ferð skulu teir spæla ímóti FCK, har Harald Brattbakk er misnøgdur við at sita á beinkinum*

Fyrrakvøldið tapti OB 2–1 á heimavølli ímóti nýgga liðnum í superliguni, FC Midtjylland ella FCM, sum tað verður rópt í Danmark.

Føroyski landsliðsspælarin, Johan B. Hansen, var á OB liðnum allar 90 minuttirnar. OB var í 3–5–2 uppstilling, og Johan var í høgra borði í verjuni.

FCM kom á odda í 9. minutti. OB málverjin, Jesper Christiansen, hálvbjargaði einari skotroynd. John B. Hansen var fyrstur á returbóltinum, sum hann royndi at sparka burtur úr vandastøðuni. Ólukkutíð fyri Johan og OB, so rakti bólturin í stóra FCM álopsmannin, Mogens Laursen, sum úr stuttari fjarstøðu so at siga takladi bóltin inn um málstrikuna.

OB hevði bóltin mesta partin av tíðini, men teir megnaðu ikki at spæla seg til serliga stórar málmøguleikar. Níggju minuttir eftir hvíldina økti FCM um leiðsluna, og so var tað rættiliga torført hjá OB, sum royndi at leggja uppaftur størri trýst á, og sum tískil gjørdist uppaftur tynnri í verjupartinum.

Thomas Thomasberg skoraði eitt flott mál til 2–0. Hann sneiddi framvið einum og sendi ímillum beinini á einum øðrum verjuspælara.

Tað restaðu seytjan minuttir, tá OB minkaði um munin. Søren Andersen, sum áður hevur verið yrkisspælari uttanlands, sneiddi fleiri av sær í vinstru, áðrenn hann setti bóltin í netið.

Síðstu løtuna trýsti OB sera nógv. Teir høvdu tveir stórar møguleikar, men teir fingu ikki mál, og harvið gjørdist úrslitið tað sama, sum tað var, tá liðini hittust fyrr í summar.

### Toppdystur og bonkarendin

Hetta er fyrsta árið, at FCM, sum er ein samanrenning av Ikast og Herning, roynir seg í bestu deildini. Eftir tólv umfør eru teir fyri fyrstu ferð á odda í superliguni.

Komandi sunnudag skulu teir á heimavølli spæla ímóti FCK. Felagið hjá Toda Jónsson er á fjórða plássi, men tað er lítil munur á. FCM hevur 24 stig, og FCK hevur 23 stig. Tað vil siga, at talan verður um rættiligan toppdyst. FCK hevur ikki tapt síðani 20. august.

Tað eru nógvir um boðið í FCK. Bara ellivu kunnu vera á liðnum hvørja ferð, og tað hevur við sær, at spælarar, sum halda seg vera skikkaðar til besta liðið, mugu finna seg í at sita á beinkinum.

Tá FCK sunnudagin vann 4–0 á AGF, var norski álopsmaðurin, Harald Brattbakk, mesta partin av tíðini á beinkinum. Hann hevur eina privata heimasíðu, og har hevur hann í vikuni givið til kennar, at hann heldur, at tað var synd bæði fyri hann og FCK, at hann ikki taldist millum teir fyrstu ellivu. Harvið verður hann í donskum fjølmiðlum sagdur óbeinleiðis at finnast at FCK venjaranum, Roy Hodgson.

– Hevði eg verið 20 ár, so hevði tað verið lættari at funnið seg í at sita á beinkinum, enn tað er, nú eg eri 29 ára gamal, sigur norðmaðurin. Hann kappast við Pascal Simpson um eitt pláss í álopinum. Stóri sviin skoraði sunnudagin, og tað hevur neyvan styrkt um møguleikarnar hjá Brattbakk. Todi Jónsson skoraði tvey mál sunnudagin. Hann venur nú saman við hinum í FCK, og tað er einki at ivast í, at hann verður á miðvøllinum í vinstru í toppdystinum sunnudagin.

Sunnudagin skal OB spæla á útivølli ímóti Jákupi Mikkelsen og Herfølge. AGF og Óli Johannesen fáa sunnudagin vitjan av Lyngby, sum er næstfremst í superliguni.

JH

**Støðan, danska superligan**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FC M | 12 | 7 | - | 3 | - | 2 | 21 | 12 | 9 | 24 |
| 2 | Lyngby | 12 | 8 | - | 0 | - | 4 | 21 | 18 | 3 | 24 |
| 3 | Brøndby | 12 | 7 | - | 2 | - | 3 | 33 | 13 | 20 | 23 |
| 4 | FCK | 12 | 7 | - | 2 | - | 3 | 18 | 7 | 11 | 23 |
| 5 | Silkeborg | 12 | 6 | - | 5 | - | 1 | 16 | 14 | 2 | 23 |
| 6 | Viborg | 12 | 5 | - | 4 | - | 3 | 16 | 8 | 8 | 19 |
| 7 | OB | 12 | 5 | - | 1 | - | 6 | 19 | 13 | 6 | 16 |
| 8 | AaB | 12 | 4 | - | 2 | - | 6 | 17 | 20 | -3 | 14 |
| 9 | AB | 12 | 3 | - | 4 | - | 5 | 16 | 17 | -1 | 13 |
| 10 | Herfølge | 12 | 3 | - | 2 | - | 7 | 15 | 27 | -12 | 11 |
| 11 | AGF | 12 | 3 | - | 1 | - | 8 | 12 | 26 | -14 | 10 |
| 12 | Haderslev | 12 | 0 | - | 2 | - | 10 | 11 | 40 | -29 | 2 |



# Frígerandi dansiskeið

Er veruliga neyðugt at fara á skeið fyri at læra at røra seg? Nei, tað klára flestu okkara at gera. Men ta røra okkum heilt og fult og fáa atgongd til okkara maximalu lívsmegi – tað mugu vit ofta læra okkum umaftur.

Tá vit vóru børn, kundu vit. Men so byrjaði lívsins harði skúli. Vit møttu pínu og ótta, vit blivu smæðin, ill og frustreraði. Vit rørdu okkum ikki, fyri at vit ikki skuldu hoyrast, ikki sýnast og ikki vísa ella kenna okkara kenslur. Soleiðis byggja vit okkara verjugarðar. Gerast stív í nakka og herðum, bíta saman tenn, láturin, dansurin, sangurin og tað lætta leikandi barnalyndið følnar og tagnar.

Frígerandi dansur er ein mjúkur, men máttmikil háttur at loysa upp tað, sum er stívnað og følnað. Frígerandi dansur vekir lív í kroppin, fær fram láturin og grátin, vekir andan í okkum økir skapanargleðina. Hetta kann gerast eitt upplivilsi, sum lekir og styrkir okkum í grundini.

Á skeiðinum arbeiða vit við at røra tað, ið krppurin vil. Vit lurta og læra av hvørjum øðrum, eftir serligum tónleiki.

Kvinnur og menn í øllum aldri møtast 10 ferðir, eingir forkunnleikar eru neyðugir.

Í mesta lagi 12 luttakarar.

Mánakvøld bólkur 1 frá kl. 19.30-21.10.

Leygardag bólkur 2 frá kl. 16.30-18.10.

Stað: Sankta Frans skúli »gamla kirkjan« Varðagøta 10.

Kostnaður: 500 krónur.

Tilmelding: á telefon 322070 frá mánadegnum 9. oktober 2000.

Dansileiðari: Lise Larsen.

Soleiðis lýsir Lis um nýggja tiltakið sum hon ætlar at fara undir.

Og her fortelur hon um sína bakgrund.

Tey seinastu 11 árini havi eg búð í Igge-s miðskeiðis í Svøríki.

Eri nú komin heim aftur til Føroyar at búgva.

Tí vil eg finna mær arbeiði ella skapa mær arbeiði.

Eg eri útbúgvin andingspedagogur á Waxthuset í Svøríki.

Hevði egna fyritøku og arbeiddi millum annað við frígerandi anding og dansi. Og við ráðgeving og viðgerð av fólki við ymiskum rúsevnistrupulleikum og teirra næstrafólki.

Var tað nakað ið eg sá við hesum fólkum, sum komu til frígerandi dans, so vóru tey stív, afturhaldandi, samstundis sum tey vóru forvitin at vita hvat frígerandi dansur var fyri nakað.

Frígerandi dansur er ein mjúkur, men máttmikil háttur at loysa upp tað, sum er stívnað og følnað.

Frígerandi dansur vekir lív í kroppin, fær fram láturin og sorgina – vekir andan í okkum og økir skapanargleðina í okkum.

Fríger stóra mongd av orku og gleði. Tú kanst gerast sprelskur – inspireraður.

Fært betur lívskvalitet.

Tú gloymir gerandismál í tí løtuni.

Koblar burtur alt, hvat í tankar eita.

Tað er persónlig menning, læran um at kennast við seg sjálvan, kenna sín kropp.

Tú fært kontakt við tíni følilsir og lærir at greiða frá hvussu tú hevur tað – um ikki annað í tínum rørslum, at byrja við.

Í frígerandi dansi rørir tú kroppin akkurát sum tú vilt – í egna skjótleika, egna tempo – uppá okkara egna máta.

Uttan at órógva onnur, sum eru til taðar. Tú finnir styrkina ella veikleikan í tær sjálvum.

Tað er bæði gaman og álvara í frígerandi dansi. Tú ert ikki komin í dansikapping. Ímynda tær ikki at onnur forvænta sær at tú skalt danso so ella so.

Ein og hvør sum er við – dansar akkurát sum hugurin er – tú hevur bert teg sjálvan at líta á – tú fært motión og gerst heilsusterkur – stressrelateraði problem gerast minni og vit fáa tað betur fysiskt.

Tað er ein góður máti at kommunikera uppá – sjálvt um vit ikki tosa við hvønn annan undir tíðini vit dansa!

Oftani mangla vit spontanitet í okkara lívið – tora ikki at stuttleika okkum.

Í frígerandi dansi kanst tú stuttleika tær uttan at fáa skuldarkenslur. Fært tú skuldarkenslur, so dansar tú burtur tínar skuldarkenslur.

Men koma tað ljóð úr okkum, so gera vit tað, lata tað koma, uttan at skammast.

Fólk, sum komu til frígerandi dans, vóru oftani bangin fyri at blíva dømd, bangin fyri at miseydnast.

Tordu ikki at finna styrkina í sær sjálvum.

Vit menniskju samanlíkna okkum oftani við onnur og halda ikki at vit duga líka væl sum Per og Pól, bangin fyri at onnur skulu flenna eftir okkum.

Men sum oftast eru tað vit sjálvi sum forða okkum sjálvum.

Eg byrji oftani við upphiting, brúki tónleik frá ymiskum londum, tónleik frá upprunafólkasløgum.

Trummir frá Afrika, Australien, Polynesien, sambatónleik, eisini modernaðan tónleik. Føroyskan tónleik s.s. fótatrakk ella líknandi.

Kroppurin sigur frá um eg vil dansa í gleðisrørslu ella um eg vil dansa meg ígjøgnum eina ella aðra pínu, eg stríðist við.

Blokeringar sum koma av eini ella aðrari hending ella var tvungin at seta bann fyri. Tá gerast vit stív í nakkanum og herðum – vit lótu ikki energiina flóta so sum hon eigur at gera.



*Lis Larsen*

Ella so vil kroppurin møguligani dansa, so sum eg ynskti at eg skuldi gera, tá ið eg var sjey ára gomul.

Spurningurin er so, um tað veruliga er neyðugt at fara á skeið, fyri at læra at røra seg?

Nei, tað klára flest okkara at gera. Men at røra okkum heilt og fult og fáa atgongd til okkara maximalu lívsmegi – tað mugu vit oftani læra okkum umaftur. Frígerandi dansur hjálpir okkum at frígera energi – energi sum vit sjálvi hava hildið aftur, tonk uppá roykjarar, teir halda nógvan energi aftur, hattar var eymt sagt.

Tá vit vóru børn, tá høvdu vit energi, men so møttu vit lívsins harða skúla. Vit møttu pínu og ótta – vit blivu smæðin, ill og frustreraði. Vit rørdu okkum ikki, kanska fyri at vit ikki skuldu hoyrast, ikki sýnast og ikki vísa ella kenna okkara kenslur.

Soleiðis bygdu vit okkara verjugarðar. Gerast stív í nakka og herðum, bíta saman tenn, láturin, dansurin, sangurin og tað lætta leikandi barnalyndið følnar og tagnar. Frígerandi dansur vekir lív í kroppin, fær fram láturin, veknir andan í okkum og økir skapanargleðina.

Vit slappa av og draga eftir anding, so vit fáa meiri sýrir, vekja meiri lív í okkum.

Vit noyðast ikki at føla okkum øðrvísi. Vit verða saman við øðrum í bólkaaktivitetum, lurta og læra av hvørjum øðrum eftir serligum harðum tónleiki.

Frígerandi dansur varar í ein tíma út í eitt, fyri at halda á og fáa meir energi.

Eftir tað tosa vit saman, hvussu tað var, óansæð hvussu lítið eg tordi at røra meg, var eg villigur at taka risiko ella tordi og uppdagaði eg nøkur nýggj evnir hjá mær sjálvum, sum eg ikki ánaði vóru til?

Tordi eg læta ljóð koma úr mær?

Hattar er fyri bæði kvinnur og menn í øllum aldri.

Eg havi lært fleiri fólk at kenna sum ongantíð fyrr tordu at røra seg, sum eru farin víðari á fleiri onnur dansiskeið, so sum enskan dans, latínsk dansiskeið og kunnu fara út og stuttleika sær í dag, sum ongantíð áður.

Tað vóru arbeiðspláss, sum sendu teirra fólk á frígerandi dansiskeið, eftir sum tey sóu uppá tað sum heilsurøkjandi.

Og eg fór eisini út til arbeiðspláss og hevði frígerandi dans við teimum.

Og inn á ymiskar stovnar, skúlar og inn á Gävle anstalten og hevði frígerandi dansiskeið við teir, sum sótu inni.

Tað var ferð eftir ferð, at maður mín bleiv so bilin, at eg kundi fá aymisk fólk til at dansa. Nógv eru so treisk og kundu ongantíð hugsa sær, at farið upp og dansa, so tá tey hava gjørt tað nakrar ferðir, so er tað so lívsgevandi at tey fara víðari og læra seg bæði eitt og annað, alt frá dansiskeiðum til at spæla uppá trummir ella onnur instrument.

Tað er áhugavert at arbeiða við sovorðnum fólki, sum vilja persónliga menning, vilja fáa fatur í lívskraft og stuttleika sær ábyrgdarfult.

# Finsk listaframsýning í Norðurlandahúsinum

Tann 21.10.00 letur finska listasýningin "Tre x Træ" hjá listakvinnunum, Pia Mesterton Graae, Britt Marie Friberg og Tiina Laasonen upp í Norðurlandahúsinum. Sýningin er opin fram til tann 19.11.00.

Evni, tær tríggjar hava valt, er náttúran og er hetta ikki løgið, tá havt verður í huga, at tær tríggjar eru úr landinum við teimum túsund sjógvunum, har ikki er langt frá starvsstovu til ríkidømi náttúrunar.

Pia Mesterton Graae, er listamálari og sigur sjálv, at litirnir eru í hennara valdi at mála, er sum at ganda sigur hon. Hon hevur útbúgving úr Finlandi. Og verk hennara hava millum annað verið útstillað á myndasøvnum í Danmark og Finnlandi.

Britt Mari Friberg, er ljósmyndari og við sínum svart/hvítu myndum lýsir hon náttúruna. Britt Mari er limur í elsta myndafelagnum í Finnlandi "AFK" og hevur vunnið prísir, bæði kappinum í AFK og aðrastaðni. Hon hevur tikið útbúgving inna ljósmyndir í Finlandi og hevur, umframt í Finnlandi, havt framsýningar í Kili, Italia, Føroyum og á finsku ambassaduni í Keypmannahavn.

Við á framsýningini er eisini Tiina Laasonen, sum vísir fram skurðmyndir sínar. Tiina tilevnar verk síni úr træi og hesum er ikki trot á í Finnlandi. Hon hevur nomið útbúgving í Finlandi, og hevur havt framsýningar í m.a Kanada og Bulgaria.

Thorolf Bjørklund, finskur generalkonsul, letur upp frramsýningina.

# Jólasølustevnan 2000

*Í døgunum 8.-10. desembur skipar Ítróttarfelag Fuglafjarðar fyri stórari jólasølustevnu í Ítróttarhøllini á Kambsdali*

Seinnu árini hevur Ítróttarhøllin á Kambsdali verður karmur um sokallaðar jólasølustevnur, har handlar sýna fram jólavørur og -gávuhugskot. Ein slík stevna verður aftur í ár, og hesaferð er tað Ítróttarfelag Fuglafjarðar, sum skipar fyri. Stevnan verður í døgunum 8.-10. desembur.

Jólasølustevnan ´2000, sum er heitið á stevnuni, er serliga ætla handlum og fyritøkum, sum selja vørur, sum hava okkurt tilknýtið til jólasøluna og ?høgtíðina, t.e. gávulutir, klæðir, leika, bøkur, ellutir o.a.

Stevnan letur upp fríggjadagin kl. 17.00. Leygardagin letur stevnan upp kl. 14.00 og sunnudagin kl. 15.00. Stevnan letur aftur allar dagarnar kl. 22.00.

Leygar- og sunnudagin er undirhald á pallinum frá kl. 16.00, og hvønn tíma til kl. 21.00. Talan verður um fjølbroytt undirhald, bæði til børn og vaksin. Eisini eru mótasýningar leygar- og sunnudagin.

Seinastu tíðina hevur nógv verið tosa um ansingarpláss til børnini - kanska serliga nú uppundir kommunuvalið – og tað agitera fyrireikararnir av Jólasølustevnuni 2000 eisini við. Teir báðar seinnu dagarnar, stevnan hevur opið, er nevnliga møguleiki hjá foreldrum at fáa børn síni ansaði í Ítróttarhøllini. Inni í sjálvari høllini verður eitt serstakt øki til børnini at búleikast, meðan foreldrini – í frið og náðum – kunnu keypa jólagávurnar og -stási.

Seinasta freist at boða frá luttøku til Jólasølustevnuna 2000 er mánadagin 30. oktober 2000. Áhugaðir framsýnarar kunnu ringja á tel. 444053, 444267 ella 444174 fyri at frætta nærri um tiltakið.

